# Dreymastarvið gjørdist ein marra

**Norðurlendska Ráðharraráðið hevur sagt Birgir Kruse úr starvinum sum stjóri á Nordisk Journalistcenter. Nærlagdi og nýskapandi útvarpsmaðurin gjørdist ov kreativur og óumhugsin í sínum norðurlendska stjórastarvi, og tað kostaði dýrt, tá ið Ríkisgrannskoðanin bankaði á dyrnar ein mánamorgun í september**

BAKGRUND

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*Átta mánaðir eftir, at hann tók við starvinum sum stjóri á Nordisk Journalistcenter í Århus, var dreymastarvið hjá Birgir Kruse blivin til eina marru*

Tá ið fólk frá donsku Ríkisgannskoðanin mánamorgunin 27. september 2004 komu á vitjan á Nordisk Journalistcenter (NJC) í Århus, mundi neyvan nakar hava illgruna um, at vitjanin hjá teimum grópandi fólkunum skuldu enda við tí, sum hon gjørdi.

Stjórin á NJC, Birgir Kruse, greiddi í drúgvari grein í Sosialinum tveir dagar frammanundan frá tí lutvíst nýggju uppgávuni hjá sær á norðurlendska miðdeplinum í Århus, men síðani hevur hann so at siga ikki vilja tosað við fjølmiðlarnar, eftir at hann gjørdist høvuðspersónurin í einum eymum og tyngjandi máli.

Vitjanin hjá Ríkisgrannskoðanin var partur av arbeiðnum at grannskoða roknskapin hjá NJC fyri 2004, og tá fólkini gjørdu stakroyndir av skjølum, komu tey fram á ymiskt, sum tey ikki hildu verða í lagi.

Tað gjørdist byrjanin til tað, sum øll nú vita um.

Stjórin Birgir Kruse varð lagdur undir óreglusemi, ovurnýtslu og vánaliga leiðslu, og nú er hann sagdur úr starvinum.

### Fekk dreymastarvið

Ein lepi á einari uppslagstalvu í húsinum hjá føroyingafelagnum í Århus var ein tann fyrsta ábendingin um, at Birgir Kruse hevði eina spennandi avbjóðing fyri framman.

Birgir Kruse sóknaðist í november 2003 eftir einari íbúð í Århus, og orsøkin til tað var, at hann var stillaður inn til stjórastarvið á Nordisk Journalistcenter í jútska høvuðsstaðnum.

– Hetta er eitt dreymastarv, segði Birgir Kruse við Sosialin, og bæði hann og aðrir føroyingar vóru ernir av, at hann hevði fingið eitt so týðandi norðurlendskt leiðarastarv.

Men dreymurin gjørdist til ein marru fyri mannin, sum í sínum yrki sum útvarpsmaður var kendur sum bæði nærlagdur og nýskapandi. Í Norðurlandahúsinum hevði hann ein sentralan leiklut í Listastevnuni, sum var eitt nýbrot í føroyskum mentanarlívi. Og nú skuldi hann sleppa at royna flogi á einum norðurlendskum stovni í Danmark.

1. februar 2004 byrjaði Birgir Kruse í starvinum á NJC, men longu átta mánaðir seinni róku myrk skýggj inn yvir Vennelystparken í Århus. Ríkisgrannskoðanin kom á eina vanliga vitjan í sambandi við ársroknskapin fyri 2004, men vitjanin gjørdist í grundini alt annað enn vanlig, tí hon hevði seinni við sær, at stjórin misti starvið á stovninum.

### Tyngjandi kanning

Tann 7. oktober kom Ríkisgrannskoðanin við einari frágreiðing um viðurskiftini á Nordisk Journalistcenter, og hon var tyngjandi fyri stjóran.

Ríkisgrannskoðanin vildi millum annað verða við, at stjórin hevði brúkt pengar uttan neyðuga heimild, hevði ábyrgdina av einari generellari ovurnýtslu á stovninum og hevði gjørt seg sekan í vánaligari projektleiðslu. Harafturat vóru eisini atfinningar av meira persónligum slagi ímóti stjóranum.

Hetta fekk stýrið fyri NJC úr stólinum alt fyri eitt. Longu dagin eftir heitti stýrið fyri NJC á Norðurlendska Ráðharraráðið um at siga stjóranum úr starvi, tí stýrið hevði mist alt álit á honum og vildi ikki halda fram at samstarva við hann. Hóast Birgir Kruse varð biðin um at fara úr starvinum sjálvur, valdi hann at stríðast fyri seg, og tað hevði við sær eina drúgva hoyringsrundu, sum endaði fyrst í farna mánaði.

Tann 14. februar sendi Norðurlendska Ráðharraráðið eitt ætlanarskriv til Birgir Kruse, har tað var gjørt føroyska stjóran greitt, at Ráðharraráðið fór at siga honum úr starvinum á NJC. Orsøkin var, at Ráðharraráðið hevði mist álitið á honum sum stjóra, og at hetta misálit kundi ikki fáast av vegnum aftur.

### Harðar atfinningar

Í ætlanarskrivinum frá Norðurlendska Ráðharraráðnum verður grundgivið neyvt fyri, hví Birgir Kruse skal sigast úr starvi, og tað eru fleiri ymisk viðurskifti, sum liggja til grund fyri uppsøgnini.

Nøkur av ítøkiligu viðurskiftunum vóru, at stjórin á NJC av órøttum hevði fingið endurgjald frá NJC fyri eina ferð í Føroyum, sum av fyrstan tíð skuldi verða ein feria. Stjórin hevði brúkt ov nógvar pengar til ein sonevndan »Rektors aften« heima hjá sær sjálvum í Århus. Hann hevði eisini latið skeivar upplýsingar um matstovuvitjanir í sambandi við eina ferð í Skt. Pætursborg í Russlandi, og harafturat vóru eisini atfinningar av meira persónligar slagi ímóti stjóranum – millum annað rúsdrekkanýtslu í sambandi við skeið hjá NJC.

Samanumtikið kom Norðurlendska Ráðharraráðið til ta niðurstøðu, at Birgir Kruse var óegnaður sum stjóri fyri NJC, og Ráðharraráðið gjørdi greitt, at tað fór at fylgja tilmælinum frá stýrinum fyri NJC um at siga honum úr starvi.

## Fakta

o Í november mánaði 2004 innstillaði stýrið fyri Nordisk Journalistcenter (NJC) í Århus Birgir Kruse til starvið sum stjóri fyri NJC. 14 umsøkjarar vóru til starvið, men Birgir Kruse varð innstillaður av stýrinum. Norðurlendska Ráðharraráðið skuldi endaliga seta starvið.

o 1. februar 2004 byrjaði Birgir Kruse í starvinum sum stjóri fyri Nordisk Journalistcenter. NJC skipar millum annað fyri skeiðum fyri norðurlendskar journalistar.

o Í døgunum frá 27. til 29 oktober kannaði danska Ríkisgrannskoðanin roknskaparlig viðurskifti á NJC í samband við ársroknskapin fyri 2004. Ríkisgrannskoðanin helt seg tá koma fram á ymisk viðurskifti, sum vóru mett sum óreglulig.

o Tann 7. oktober kom Ríkisgrannskoðanin við sínari frágreiðing um viðurskiftini á NJC. Í frágreiðingini vóru tyngjandi upplýsingar um stjóran, sum millum annað hevði brúkt pengar hjá NJC uttan neyðuga heimild, hevði fingið endurgoldið uppihaldspengar fyri eina ferð í Føroyum av órøttum og hevði havt eina generella ovurnýtslu av pengum í sambandi við verkætlanir. Harafturat vóru eisini tyngjandi upplýsingar av meira persónligum slagi um stjóran.

o Longu dagin eftir, tann 8. oktober 2004, mælti stýrið fyri NJC norðurlendska Ráðharraráðnum til, at stjórin varð sagdur úr starvi.

o Norðurlendska Ráðharraráðið fór undir eina hoyringsrundu fyri at koma til botns í málinum, og hendan hoyring endaði við einum fundi tann 8. februar 2005, har Birgir Kruse var ein av luttakarunum.

o Tann 14. februar varð eitt ætlanarskriv sent til Birgir Kruse, har tað varð gjørt honum greitt, at Ráðharraráðið fór at siga honum úr starvinum sum stjóri fyri NJC. Í skrivinum var grundgivið neyvt fyri, hví Ráðharraráðið hevði mist álitið á føroyska stjóranum og vildi siga honum úr starvi. Birgir Kruse fekk tvær vikur til at svara skrivinum, áðrenn avgerðin varð sett í verk.

o Birgir Kruse er nú sagdur úr starvinum og hevur seks mánaðar uppsagnartíð.

# Minni blóðugt um Birgir fór sjálvur

**Formaðurin fyri stýrið á Nordisk Journalistcenter heldur, at Birgir Kruse skuldu havt sagt seg úr starvinum sjálvur**

UPPSØGN

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tá ið stýrið fyri Nordisk Journalistcenter (NJC) fekk fyrstu frágreiðingina frá Ríkisgrannskoðanini um viðurskiftini á NJC, misti stýrið alt álit á stjóranum Birgir Kruse.

– Vit vistu, at Ríkisgrannskoðanin hevði verið á vitjan, men tað kom óvart á okkum, at kanningin var so tyngjandi fyri stjóran, sigur norski journalisturin Lars Helge Rasch, sum stýrisformaður fyri NJC.

Frágreiðingin í oktober mánaði í fjør fekk stýrið at handla beinanvegin.

– Vit gjørdu eina niðurstøðu við trimum møguleikum. Tann fyrsti var, at stjórin sjálvur segði seg úr starvi. Tann næsti var, at Ráðharraráðið segði honum úr starvinum. Og tann triði møguleikin var, at alt stýrið legði frá sær, um ikki Birgir Kruse varð sagdur upp ella sjálvur segði upp.

### Minni blóðugt

Birgir Kruse vildi ikki siga seg úr starvinum, og Ráðharraráðið hevur tí kannað málið til botns í fimm mánaðir og er komin til ta niðurstøðu, at stjórin skal sigast upp.

– Málið hevði verið nógv minni blóðugt, um Birgir Kruse beinanvegin segði seg úr starvinum. Tað vildi hann ikki, hóast tað hevði verið besta loysnin fyri hann, og tí gjørdist hetta til eitt drúgt og slítandi mál fyri allar partar, heldur Lars Helge Rasch.

Stýrisformaðurin sigur, at málið hevur tarnað rakstrinum av NJC í fleiri mánaðir.

– Nú meta vit hetta málið verða avgreitt, og nú vóna vit, at viðurskiftini á NJC aftur verða so vanligt, so at stýrið kann arbeiða við teimum málum, sum tað eigur.

Tað hevur ikki eydnast Sosialinum at fáa orðið á Birgir Kruse, men hann hevur fleiri ferðir sagt við fjølmiðlarnar, at hann vil ikki gera viðmerkingar til málið.